## Neyðtøkumaður tikin

Bretska løgreglan hevur tikið ein 52 ára gamlan mann, sum er undir illgruna fyri meiri enn 100 álop og neyðtøkur tey seinastu 17 árini. Hansara offur hava verið eldri menn og kvinnur í London, og har bleiv maðurin tikin í gjár. Rannsóknarmenn hjá Scotland Yard siga seg vera sannførdar um, at maðurin er sekur í minst 108 álopum og neyðtøkum, men at tað veruliga talið kann vera næstan 200. Maðurin gjørdi seg bara inn á eldri fólk. Tað yngsta offurið var 68 og tað elsta 93, skrivar Reuters-tíðindastovan.





## Avstralsk umbering

Í Avstralia hevur Kevin Rudd, forsætisráðharri, biðið um almenna umbering fyri, at umleið ein hálv millión avstralsk børn vóru fyri kynsligum ágangi í árunum frá 1930 til 1970, meðan tann almenna barnaforsorgin hevði ábyrgdina av teimum. Umberingin kom í einari sera kenslubornari røðu, sum forsætisráðharrinn helt í tjóðartinginum í nátt okkara tíð. Umleið 1.000 fólk vóru komin í tingið at lurta eftir røðuni, og teirra millim vóru fleiri, sum vóru fyri kynsligum ágangi, meðan tey vóru á stobnum, sum tann almenna barnaforsorgin hevði ábyrgdina av.

# Fyrireika nýggjan fRískúla í Skálafirði

**Gongst sum ætlað verður ein nýggjur skúli nú settur á stovn í Skálafirði. Fyrireikingarnar eru komnar væl áleiðis, og bíðað verður nú eftir at Mentamálaráðið skal svara eini umsókn, soleiðis at skúlin kann byrja longu komandi summar. - Vit miða eftir at fáa glaðar, sjálvstøðugar og væl upplýstar næmingar, sigur Jastrid Høj, sum er forkvinna í fyrireikingarbólkinum**

**SKÚLI**
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Í Skálafirði: Tað var tann tíð, tá børnini í bygdini gingu í lítla bygdarskúlanum, sum liggur niðanfyri høvuðsvegin.

Nú verða fyrireikingar gjørdar til ein størri og meiri víttfevndan skúla, sum skal halda til omanfyri høvuðsvegin í samkomubygninginum hjá Kelduni í Skálafirði.

Her fáa næmingar allastaðni frá møguleika til skúlagongd í bæði forskúla og frískúla, og ikki minst í hølum sum eru vælegnað til skúlabrúks.

Arbeiðið við at fyrireika skúlan er komið rættiliga væl áleiðis. Longu nú er greitt, at ætlanin er at byrja við einum forskúlaflokki og einum 1. flokki, og síðani hava eina tilgongd frá forskúla ella 1. til 7. flokk.

Endamálið við skúlagongdini er sjálvandi at børnini skulu fáa nógv burturúr fakliga. Men dentur verður soleiðis lagdur á, at teir skulu gerast tryggir, glaðir, sjálvstøðugir og væl upplýstir persónar, sum æra Gud og eru ein signing fyri familju, samkomuna, kirkjuna og samfelagið.

Nýggi fríksúlin fær ikki óvæntað navnið "Keldan".

### Stórur áhugi

Fyri sløkum tveimum vikum síðani varð tann fyrsti kunnandi áhugafundurin um henda fRískúlan hildin í stórsalinum hjá samkomuni Kelduni í Skálafirði.

Væl av fólki var komið saman og stórur áhugi var fyri skúlanum. Her kom fram, at samkoman hevur sent ein umsókn til Mentamálaráðið 1. september í ár, og at ein í løtuni bíðar eftir einum svarið hagani.

Fyri at fáa ta endaligu góðkenningina skal eisini ein áhugalisti við foreldraundirskriftum latast inn til Mentamálaráðið áðrenn 1. desembur. Hesarundirskriftir skulu vísa, at grundarlag er fyri at stovna fríkúlan. Fríkúlin skal hava 12 undirskriftir til forskúlan og 12 undirskriftir til 1. flokk.

Fyrireikingarnar til fríkúlabygnaðin eru í gongd. Ein arbeiðsbólkur er settur, sum arbeiðir miðvíst fyri at skapa karmarnar um fríkúlan.

### Integrering

Hóast skúlin enn ikki hevur fingið endaliga loyvið, er greitt at forskúli, skúli og frítíðarstova verða á einum og sama staði.

Hølini í samkomubygninginum hjá Kelduni eru nýmótans og væl egnað til skúlavirksemi, og umhvørvið í Skálafirði er eisini góður karmur um hetta virksemið.

Eitt av endamálunum við skúlanum er at hann skal verða fyri allar næmingar.

- Málið er at integrera næmingar við serligum tørvi, saman við tí vanliga flokkinum í mest møguligan mun, greiðir Jastrid Høj frá.

Dentur verður tí lagdur á eitt gott samstarv við foreldrini, har tey eru ein virkin partur av skúlanum.



*Nýggi fríkúlin fer at halda til í smakomubygninginum hjá Kelduni í Skálafirði. - Hann fær navnið "Keldan", upplýsir Jastrid Høj, forkvinna í fyrireikingarbólkinum*





*Inni í Kelduni eru góðar umstøður til at hýsa børn í øllum aldrum*

## FAKTA um fríkúlan »Keldan«

Heldur til í samkomubygninginum Kelduni í Skálafirði

Skúlin fylgir lesiætlanini fyri fólkaskúlan, og heldur seg haraftrat til løgtingslógina um fríkúlar frá 2002.

Endamálið er, at fríkúlin, sambært fólkaskúlaskílalógini vil í sátt og samvinnu við foreldrini hjálpa til at geva næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling

Fríkúlin fær 85% í stuðli frá landsmyndugleikanum, og foreldrini gjalda 15%. Gjaldið hjá foreldrunum fyri hvørt barnið verður umleið 500 kr. um mánaðin.

Verður eftir ætlan klárur til skúlaárið 2010/2011

Áhugað kunnu venda sær til Jastrid Høj, forkvinnu í fyrireikingarbólkinum við telduposti: jastrid@keldan.fo ella á tlf. 742500.

## Hetta vil nýggi fríkúlin

Í longri tíð hevur verið arbeitt við at fyrireika fríkúlan. Og her hevur ein sett sær nøkur mál, ið ein ynskir at røkka:

Ætlanin er í fyrstu syftu, at uppala næmingarnar til at gerast tryggar, glaðar, sjálvstøðugar og væl upplýstar persónar, sum æra Gud og eru ein signing fyri familju, samkomu/kirkju og samfelagið.

Foreldrini skulu somuleiðis stuðlast í teirra ábyrgd at læra, venja, uppala og vegleiða síni børn.

Út frá hesum ynskir ein at menna næmingin á hesum økjum:

### - Í kunnleika

Taka støðið í tí einstaka.

Læra næmingarnar at kenna sín lærihátt og at menna hann í undirvísingini.

Gera menningarætlanir fyri hvønn næming og hava regluligar eftirmetingar saman við foreldrum og næmingum.

At KT er ein dagligur partur av undirvísingini.

### - Sosialt

Skúlin setir trivnaðin í hásætið og fyribyrgir happing.

Læra næmingin at samskifta við onnur menniskju.

Læra at virða menniskju, ið eru øðrvísi.

### - Likamliga

Leggja dent á ein heilsugóðan lívsstíl: Næmingarnir skulu røra seg ein part av degnum og læra um heilsugóðan mat.

Mennast í einum skapandi umhvørvi úti og inni. Gera brúk av náttúruvinarliga umhvørvinum í Skálafirði við haga, fjøru og á.

### - Andaliga

Vísa á góðar søguligar og bíbilskar fyrimyndir sum t.d. móðir Theresu og Jesus. Arbeiða við eginleikum frá ymsum fyrimyndum, sum geva eitt grundarlag fyri karakterbygging.

Geva rúm fyri grundleggjandi lívsspurningum.

- Vónin er, at úrslitið av einum tryggum umhvørvi, sum gevur rúm fyri læring, verða glaðir, sjálvstøðugir og vælupplýstir næmingar.